# Frásøgufrymil

Her sært tú mynd av frásøgufrymlinum og frágreiðing um 1. og 2. skifti í eini søgu.






Ein frásøgufrymil vísir menningina í eini søgugongd frá byrjan til enda. Frymilin er beinagrindin í søguni.

Fyrstu ferð okkurt serligt hendir í ævintýrinum, fer ein broyting fram, ið ger, at einki er, sum tað var frammanundan. Hetta staðið í ævintýrinum kalla vit 1. skifti.

2. skifti hendir, tá frásøgnin er mest spennandi, tí her er óvist, um søgan endar væl ella illa. Ofta er tað, tá ið vit nærkast endanum á søguni.